# Tann myrki skjálvtin

## Portrett av skaldinum Harold Pinter sum fekk Nobelvirðislønina í 2005



*Eftir Hanus Kamban*

Ert tú staddur í London, og verður tú móður av bríkslandi fartelefonum ella vappandi mappuprinsum, so far tær niður í dýpisins katakombur og lat tokið føra teg eftir Central Line til støðina Bethnal Green í East End.

Fert tú út her, og gongur tú tær í ein norðan, kemur tú til eitt umráði so ruðuleikakent, órøkt og troystarleyst, at tú næstan verður væl til passar. Bygningar, um at detta, við blindum vindeygum og morknandi múrsteinum, urtagarðar avvaksnir við hømilium og rótfrekum dáa, skeivar brýr og stinkandi kanalir gálva ímóti tær í hesi oyðimørk, ið fyri tað kundi verið droymd av Poe, Victor Hugo ella H.P. Lovecraft.

Tá ið tú hevur gingið í ein slakan tíma, kemur tú, ikki langt frá har áin Lea fer streymandi makliga á síni leið móti Themsánni, til eina gøtu, sum ber navnið Thistlewaite Road. Her er vert at steðga á. Tí í einum av múrsteinshúsunum í hesi gøtu, neyvari sagt nr. 19, vaks í tríatiárunum í farnu øld upp ein drongur, sum bar navnið Harold Pinter. Og fyri trimum vikum síðani varð kunngjørt úr Stockholm, at hesin sami Pinter hevði fingið nobelvirðislønina í bókmentum.

### BECKETT OG KAFKA

Harold Pinter er av jødiskari ætt. Hansara forfedrar og formøður, við eftirnøvnum sum Pinter og Moskowitz, komu til London, úr Póllandi og Odessa, um aldarskiftið fyrra og megnaðu at skapa sær eina útkomu sum skraddarar og klædnahandlarar. Pinter, sum var føddur í 1930, vaks upp í Hackney, kom frá ungum árum at kenna ta antisemitismu, sum tá livdi við sítt fríska lív í hesum arbeiðarabýlingi, styrknaði í hesum harðføra umhvørvi og lærdi at svara aftur, um hann varð álopin.

Pinter tók studentsprógv í 1948 á Hackney Downs Grammar School. Hesin unglingi, sum heimanífrá í skjáttuni hevði við sær áhuga fyri list, las dúgliga og varð tíðliga hugtikin av høvundum sum T.S. Eliot, Dostojevskij, Rimbaud, Beckett og Kafka. Hann legði seg serliga eftir at dyrka modernismuna og loypti hvøkk á foreldrini, tá ið hann fimtan ára gamal ognaði sær eitt eintak av skaldsøguni *Ulysses* eftir James Joyce.

Men hansara høvuðsáhugi var sjónleikur. Eftir lokið studentsprógv livdi hann av at vera sjónleikari og var við í ferðandi sjónleikarbólkum, sum førdu fram bæði í Írlandi og ymsastaðni í Onglandi. Líkasum Shakespeare lærdi Pinter soleiðis kunstin at skriva leikrit við í mong ár sjálvur at standa á pallinum, bera replikkirnar fram og síggja og sjálvur uppliva, hvørt høvundsins dramatiska gonguverk stóð, ella ikki stóð, sína roynd.

### HØVUÐSVERKINI

Pinter hevur latið úr hondum stuttsøgur, yrkingar og politiskar viðmerkingar. Men hann er fyrst og fremst sjónleikahøvundur, og hann hevur loyst úr lagdi tilsamans o.u. 30 leikrit. Hansara mest kendu leikir - sum av teimum flestu verða hildnir at vera hansara høvuðsverk - eru *The Birthday Party* (Føðingardagsveitslan), 1958, *The Caretaker* (Húsavørðurin), 1960 og *The Homecoming* (Heimkoman), 1964. Seinni komu tveir aðrir høvuðsleikir: *Old Times* (Gamlir dagar), 1971 og *No Man´s Land* (Ongamannaland), 1975.

Men eisini seinni leikir, eitt nú *Ashes to Ashes*, 1996, og politiskir leikir sum *One For The Road*, 1984 og *Mountain Language* (Fjallamál), 1988, hava vakt ans. Pinter hevur eisini skrivað ein hóp av filmsleikritum, sum øll bera dám av hansara úrlíka kræsna og virtuosa replikkhegni. Dømir um hetta eru filmir sum *The Servant* (Tænarin), eftir skaldsøgu hjá Robin Maugham, *The Go-Between* (Sendiboðið) eftir skaldsøgu hjá L.P. Hartley, *The French Lieutenant´s Woman* (høvundur: John Fowles) og *Rættarmálið* eftir meistaraverkið hjá Kafka.

### STOKKUT VIST Í HIMMIRÍKI

Við leikinum *Húsavørðurin* var greitt, at nú hoyrdist ein rødd á enskum leikpallum, sum bæði áskoðarar og ummælarar áttu at geva gætur. Høvuðspersónurin í hesum leiki, Davis, er eitt gamalt, lurvut landastrok, sum eina stutta tíð fær innivist í einum rúmi í einum húsum í Vesturlondon, har brøðurnir Mick og Aston halda til. Tann góðvarni, seini og lítið vitugi Aston vísir hesum fremmanda beinasemi og býður honum at fáa starv sum húsavørður.

Men tá ið tann meira gløggi og at sær komni Mick kemur upp í leikin, fellur Davis fyri tí freisting at svíkja sín fyrsta vælgerara. Aston hevur avdúkað, at hann einaferð hevur fingið elektrosjokk og er skaddur av hesi viðgerð, og Davis brúkar hesa vitan til at fáa fyrimunir hjá Mick. Hetta kostar honum hansara einasta møguleika at koma burtur úr síni oyðimørk. Tá ið leikurin endar, er hann aftur úti á gøtuni - heimleysur.

*Húsavørðurin* er uttaná ein neyvt naturalistiskur leikur við eyðkendum London-dámi, sum sæst m.a. bæði av staðanøvnum og orðalagi. Men hóast høvundurin ikki, ella næstan ikki, brúkar ímyndir, er leikurin samstundis metafora, eitt bílæt av einum ævinligum menniskjansligum drama. Á gáttini til endan á sínum andaliga og handaliga troystarloysi letur Davis seg føra av leið av teirri vælkendu freistingarrødd, sum grikkar róptu *hubris*, og noyðist at rinda fyri hetta.

Tá ið undirritaði einaferð var so heppin at síggja henda leikin framførdan, við fyrimyndarligum hegni, í London, tað mundi vera mitt í sjeytiárunum, var tann uppliving, ein fekk, týðiliga bíbilsk. Hetta var einki minni enn sjálvt syndafallið, framført í ónossligum og vesælum stórbýarhami, við Mick sum Várharra og Davis sum Ádam.

### SAMANSTÚGVAÐIR MENN

Tá ið tann næsti høvuðsleikurin hjá Pinter - *Heimkoman* - varð frumsýndur í London í 1964, høvdu tíðarinnar leikstjórar sett nýggja dagsskrá í kvøldlandinum. The Beatles og Bob Dylan dagaðu á pallinum, Marcuse, Watts og Paul Goodman gjørdu vart við seg, úr Kalifornia seyraði angin av zen, og í Fraklandi og USA høvdu lesarar langt síðani vant seg við orðalagið hjá Jean Genet og Henry Miller.

Kortini megnaði Pinter við hesum leiki at skelka bæði hyggjarar og ummælarar. Vit eru stødd í einum húsum í Norðurlondon. Her búgva Max, sum er slaktari og einkjumaður, synir hansara Joey og Lenny, og beiggi hansara Sam, sum koyrir hýruvogn. Joey, sum droymir um at gera brøgd sum nevaleikari, er nakað av einum drumbi, Lenny er hinvegin bæði gløggur og skarpur, við eini tungu, sum bæði kann vera slokt, fúl og órein. Hvat hesin garpur ger, vita vit ikki enn.

Inn í hetta umhvørvi, har orðalagið er bonskt og kvettut, og kenslan av mannligari klaustrofobi rom, koma eitt kvøldið seint tvey fólk: Teddy og kona hansara Ruth. Tað vísir seg, at Teddy er tann triði sonurin hjá Maxi. Hann býr nú við sínum húski í Kalifornia, har hann undirvísir í heimspeki. Hjúnini hava verið eina ferð í Italia og vilja nú á heimvegnum støkka inn á gólvið í faðirlonini.

### KVINNAN SUM VERULEIKI - ELLA DREYMUR

Tann vakra, eleganta og sexuta Ruth verður skjótt miðdepil í hesum mannliga trongrúmi, har óndskapur og ónøktaður gessur seyra úr hvørjari rivu. Ein orðadráttur tekur seg upp millum Ruth og Lenny, har Ruth sum einki er við yvirlutan. Tá ið tað samstundis verður greitt, at hjúnalagið millum Ruth og Teddy stendur fyri falli, at tann hálv-intellektuelli Lenny livir av at vera alfonsur, og at eisini Ruth hevur eina ivasama fortíð, klárnar fyri hyggjaranum.

Ruth stendur nú í boði at velja burtur úr hesum skara av áhugaverdum heiðursmonnum. Hon velur Joey, sum hon fær í lag eitt samband við, ið er av greidligа holdligum slag. Seinni í leikinum skjýtur Lenny upp, at hon kann fáa starv hjá familjuni sum yrkis-gleðigenta. Ruth tekur av, men leggur samstundis treytir við, m.a. at sáttmáli verður skrivaður, og at hon fær eina íbúð við trimum kømrum, baðirúmi og arbeiðskonu.

Henda gongd kann tykjast lítið sannlík, men lesarin eigur at hava í huga, bæði at tað umhvørvið, høvundurin her lýsir, er meira ógagnsasligt og kriminelt, enn tað tykist, og at leikirnir hjá Pinter altíð virka á ymiskum hjallum samstundis, á veruleikans, dreymsins ella metaforunnar stigi í senn.

Ruth, sum er lýst við neyvum strikum, kann samstundis vera dreymahugmynd ella persónsgerð í einum rúmi, har ein ødipalur uppreistur fer fram. Onkur ummælari hevur enntá hildið leikin verið feministiskan. Ruth fer við síggjandi eygum inn í eina tilveru sum yrkisprostituerað, men tað er hon, sum setir treytirnar, og tað er hon, sum við



*Leikurin* Mountain Language, *framførdur á Lyttelton í 1988, sipar til Turkalands blóðugu herferð móti kurdum. Á myndini sæst Miranda Richardson sum ung kvinna*